# Eru leiddir og keddir av at liggja í klemmu

**Hovbingar tíma ikki longur at teir altíð skulu liggja sum lús ímillum tvær negl**

SAMSTARV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Hov liggur sum lús ímillum tvær negl ímillum Vág og Tvøroyri. Vit samstarva við báðar partar og tað ætla vit at halda fram við. Tí ætla vit ikki at læsa okkum fastar, sigur borgarstjórin í Hovi*

- Vit eru leiddir og keddir av at vit alla tíðina skulu taka støðu til norðaru og syðru helvt í Suðuroynni.

Delmar Tausen, borgarstjóri í Hovi, sigur, at tvídrátturin ímillum norðaru og syðru helvt í Suðuroy hongur teimum langt út av hálsinum.

Hov liggur mitt í Suðuroynni og tá ið koyrandi er ígjøgnum Hovstunnilin, er áleið líka langt úr Hovi á Tvøroyri, sum tað er úr Hovi til Vágs.

Men tað skerst ikki burtur, at tað er ein ávís kapping á ymsum økjum ímillum syðru helvt í Suðuroy við Vág á odda og nroðaru helvt í oynni við Tvøroyri á odda. Ikki minst kemur hendan kppingin til sjóndar, tá ið tað snýr seg um at fáa almennar tænastur og almenn arbeiðspláss í suðuroy.

Og av tí at hovbingar liggja mitt í millum, skulu teir javnan og savnan taka støðu til, hvønn part teir vilja samstarva við, norðaru helvt ella syðru helvt.

Seinasta dømi um hetta var nú ætlanin var at stovna eina felags sosiala deild fyri Suðuroy.

Tað miseydnaðist, tí vágbingar vildu ikki ganga undir treytirnar, sum lógu á borðinum um, at sosiala deild skuldi vera á býráðsskrivstovuni á Tvøroyri, samstundis sum um at hon skuldi fevna um so nógv viðurskifti, at ein býráðslimur í Vági helt fyri, at so kundu tey akkurát tað sama avmontera Vágs Býráð.

Sostatt hava fýra kommunur í Suðuroy nú tikið seg saman um eina felags Sosiala deild: Tær eru syðsta kommuna í oynni, Sumbiar Kommuna og tær tríggjar norðastu kommunurnjar, Tvøroyri, Fámjin og Hvalba.

Samstundis arbeiða Vágur og Porkeri við at stovna eina felags sosiala deild fyri tær báðar kommunurnar.

Sostatt er bara Hov eftir, sum nú liggur sum lús ímillum tvær negl.

Spurningurin hevur verið um hovbingar ætlar sær upp í eitt samstarv við Vág og Porkeri um sosiala deild, ella um teir heldur venda kikaran norðureftir og samstarva við Tvøroyri & co.

Men Delmar Tausen, borgarstjóri í Hovi sigur, at hovbingar ætla at halda seg heilt uttanveltaðar.

Hann sigur, at bygdaráðið í Hovi hevur viðgjørt spurningin um sosiala deild í Suðuroy.

- Niðurstøðan var, at fyribils fara vit hvørki upp í samstarvið ímillum Vág og Porkeri ella upp í hitt samstarvi, sigur hann.

- Vit skulu javnan og savnan taka støðu til um vit skulu samstarva við syðru helvt ella norðaru helvt í Suðuroy og tann leiklutin tíma vit ikki at vera í longur, sigur hann.

Nógvir hovbingar arbeiða á Tvøroyri og hovbingar arbeiða eisini í Vági. Og tað kann ikki vera meiningin, at teir, sum arbeiða á Tvøroyri, skulu fyrst til Vágs við børnunum á dagstovn, ella øvugt.

Hann vísir á, at hovbingar samstarva væl við bæði Vág og Tvøroyri og tað ætla teir at halda fram við.

Hovbingar hava havt børn í ansing bæði á Tvøroyri, í Porkeri og í Vági. Annars samstarvar Hovs Kommuna við Vág um læknamiðstøð, sløkkiliðið og annað.

Tað eru samstørv, sum rigga væl og tað ætla vit at halda fram við, sigur Delmar Tausen

- Tí ætla vit hvørki at binda okkum at øðrum partinum ella hinum, leggur hann afturat.

# Tilboðið er ov gott til at vísa aftur

**-Ístak hevur boðið sær til at gera tunnil til Fámjins fyri bara 27 milliónir og tí vil eg ava at vita um ætlanin er at gera nakað við hetta tilboð, sigur Hergeir Nielsen**

FÁMJISNTUNNIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hergeir Nielsen, løgtingsmaður, vil nú hava at vita um samgongan er sinnað at gera tunnil til Fámjins.

Hann vísir á, at nú Ístak er í Suðuroy við fólki og útgerð í sambandi við Hovstunnil, hava teir boðið sær til at bora ein tunnil til Fámjins fyri bara 27 milliónur krónur.

Talan er um ein tunnil, ið er 600 metrar langur.

Men hann vísir á, at tað er neyðugt at bera skjótt at, tí Hovstunnilin er um at vera liðugur og í vár fer Ístak sostatt at rigga av í Suðuroy.

Hergeir Nielsen heldur, at boðið frá Ístak er sera áhugavert. Og á Løgtingsfundi í dag spyr hann Bjarna Djurholm, landsstýrismann um samgongan veruliga bara ætlar sær at liggja á ætlanini, ella um nøkur ítøkilig stig verða tikin fyri at fáa tunnilin gjørdan.

# Vil kanna tænastustøðið hjá almennum stovnum

**- Gera vit eina nøgdsemiskanning, kunnu vit geva teimum bestu almennu stovnunum eitt herðaklapp, heldur Kári P. Højgaard, Løgtingsmaður**

ALMENNAR TÆNASTUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað hevði verið upp á sítt pláss at gjørt nøgdsemiskanningar av almennum stovnum, fyri at vita, hvussu tænastustøðið er.

Tað heldur Kári P. Højgaard, løgtingsmaður.

Á løgtingsfundi í dag fer hann at spyrja løgmann, um landstýrið hevur nakrar ætlanir um at gera óheftar nøgdsemiskanningar av almennu stovnunum og partafeløgunum fyri at vita, hvussu nøgdir brúkararnir eru við tænastuna.

- Vit hoyra dagliga um misnøgd við almennar stovnar, sigur hann.

Hann sigur, at talan kann vera um seina avgreiðslu og um langa telefonbíðitíð, tá samskiftast skal við almennar stovnar.

Hann heldur, at uttan iva veita flestu almennir stovnar ein góða tænastu.

- Men sakliga er tað torført at burturvísa, at misnøgdir borgarar í summum førum hava grein í sínum máli, leggur hann afturat.

Hann heldur, at ein møguleiki fyri at staðfesta tænastustøðið hjá tí almenna, er at gera regluligar nøgdsemiskanningar av øllum stovnum og partafeløgum, ið tað almenna varar av.

- Hendan kanning kundi verið gjørd við spurnarbløðum á staðnum, telefon ella ella teldubrøvum.

Hann mælir til, at tað verður ein óheftur stovnur, sum stendur fyri arbeiðnum, eitt nú Hagstovan, Gallup ella Fynd.

- Vórðu kanningar gjørdar regluliga og úrslitið almannakunngjørt, hevði verið gjørligt at staðfest, um veikleikar veruliga eru í almennu fyrisitingini, og hvar hesir vóru. Somuleiðis høvdu kanningarnar verið fyribyrgjandi og mennandi fyri skipanina.

- Tað hevði givið positiva kapping millum stovnarnar, og starvsfólkini høvdu kýtt seg enn meira, fyri at fingið eitt gott úrslit og harvið eitt gott andlit út til brúkaran.

Kári P. Højgaard sigur, at við slíkum kanningum, kundu vit fingið ein topp-trý lista yvir teir bestu og kundavinarligastu, almennu stovnarnar í landinum.

- Og teir kundu so fingið eitt munandi, fíggjarligt herðaklapp, heldur sjálvstýrismaðurin úr Runavík.